# MEIRA POTTER TIL JÓLA

18. november verður fjórði filmurin um Harry Potter frumsýndur kring heimin, og eisini í Føroyum kann nýggi filmurin síggjast á hvíta tjaldinum – í Havnar Bio.

Harvið verður Harry Potter í miðdeplinum, nú jólaresið nærkast, jólagávur skulu keypast, og jólahýrurin verður í topp.

Soleiðis hevur tað eisini verið fleiri av undanfarnu árunum. Bøkur og filmar hava gjørt Harry Potter til eitt risanavn millum børn og ung, og Potter er blivin ein handilsvøra av besta slagi.

Tað var í 1997, at JK Rowling gav sína fyrstu bók um Harry Potter út, og tað var skjótt, at hendan søgan fekk vind í seglini. Síðani eru fimm bøkur afturat komnar út, og nú standur fjórði filmurin frammanfyri sínari frumsýning.

Nú eitur filmurin Harry Potter and the Gablet of Fire, og bókin, sum hesin filmurin byggir á, varð givin út í 2000.

Harry Potter gerst eldri, og tað sæst eisini aftur í filmunum, nú hann Potter er blivin meira ein ungdómsstjørna enn barnastjørna,

Filmurin Harry Potter and the Gablet of Fire verður frumsýndur tann 18. november







**OVAST TIL HØGRU** *nærmastu vinfólk taka sær av løttum í einari scenu frá nýggja filminum*
**HINAR** *Vandarnir lúra altíð kring Harry Potter*



***Barbara í Gongini skal í næstum á messir í París, London og Berlin. Á myndini sæðst eitt av hennara sniðum á eini messu í Keypmannahavn í 2003.***
*(mynd Scanpix Danmark)*

## Barbara í Gongini
### í París, London og Berlin

Føroyski sniðgevarin Barbara í Gongini verður í næstum við á trimum stórum mótamessum, í París, London og Berlin. Her er m.a. annað talan um viðagitnu Pret a porter messuna í París. Barbara sigur, at hon seinastu tíðina hevur fingist við sera ókomersiella sniðgeving, men nú fer hon undir at royna seg á tí kommersiella pallinum, og eingin ivið er um, at hetta eru ikki hissini støð, hon roynir seg. París, London og Berlin eru millum teir mest spennandi býirnar á mótaøkinum, og bæði Pret a Porter og Bread & Butter í Berlin, eru sera týdningarmiklar messur. Barbara hevu í løtuni úr at gera, við at sniðgeva sítt vetrarúrvæl. Hon heldur, at hetta er ein sera spennandi tíð, nógv hendir á mótaøkinum, serliga í norðan londum. So tað er fantastiskt at arbeiða í hesum kreativa umhvørvinum millum øll hesi nógvu gávuríku fólkini, sigur Barbara.

*nud*



## LYKKE OG HARÐA LÍVIÐ

Danska vikublaðið Se & Hør heldur, at tað er farið at síggjast á donsku supermodellini Lykke May Andersen, at hon hevur nógv at gera og livir tað søta lívið í USA. Blaðið hevur myndir av 23 ára gomlu Lykke, tá ið hon herfyri kom á ein náttklubba og líktist alt annað enn einari supermodell. Myndin omanfyri er ikki ein av hesum nýggju myndunum, men hinvegin ein mynd av Lykke May Andersen, sum hon plagdi at síggja út.

## HALLE BERRY FEKK SØTT HEIM VIÐ

Sjónleikarin Halle Berry keypti sær ein stóra køku heim við, tá ið hon var til handils í West Hollywod um vikuskiftið. Myndamenn liggja altíð upp á lúr, tá ið tey kendu fara til handils ella í býin í Hollywood, og myndatólið klipsaði ófórt, tá ið Halle Berry steðgaði á hjá einum bakara og kom útaftur við eini stórari køku í hondini. Tað sigst, at Halle Berry gongur nógv í hattum í løtuni, og teir sigast at verða bæði øðrvísi og við hvørt skemtiligir.

*(Mynd: Scanpix)*





## MYNDAFRAMSÝNING UM U2

Heimskendi myndamaðurin Anton Corbijn lat nú um dagarnar upp eina framsýning í New York, h hann vísir myndir av rockbólkinum U2. »U2 and I« kallast framsýningin, tveir av limunum í U2 vóru til staðar, tá ið fernisering var. The Edge og Bono stukku inn á gólvið hjá myndmanninum, sum hevur fotograferað U2 í fleiri ár. Hansara myndir hava verið brúktar til kápuna á útgávum hjá U2, og nú ber til at síggja hesar myndir – og aðrar, sum ikki eru brúktar alment – á framsýningini í New York.

*(Mynd: Scanpix)*

